Løgmaður um kreppuna í rækjuvinnuni:

# Vit mugu geva rækjuvinnuni betri karmar

FISKIVINNUSTEVNA
*Jan Müller*

Um fáar dagar fer Anfinn Kalsberg, løgmaður at seta stóru Fish Fair stevnuna í Runavík. Hann fer uttan iva at fagna hesum tiltakinum men illa slepst tó uttan um at síggja allan veruleikan í eyguni. Partur av honum er ein sera trongd rækjuvinna. Vit hava spurt, hvat landsins hægsti maður heldur um støðuna hjá okkara høvuðsvinnu í løtuni.

– Tað hevur gingið ómetaliga gott í fiskivinnuni tey seinastu árini. Man hevði jú eina vinnu, sum hevði stóran stuðul fyri neyðini fyri at yvirliva. Tað er man so komin burtur úr. Tað sær eisini út til, at fiskivinnan hevur havt góðar umstøður seinastu árini til entá at endurnýggja seg uttan almennan stuðul. Tað sær tí rættiliga gott út men løgmaður viðgongur samtíðis, at tað eru nøkur myrk skýggj at hóma eisini. Ma. hevur rækjuflotin tað ikki gott í løtuni. Og tað sær eisini út til, at vøksturin, sum hevur verið í vinnuni, er flataður út. So man skal ikki taka nakað fyri givið nakra staðni.

*Nú tað sansar álvarsliga at í pørtum av vinnuni, eitt nú hjá rækjuvinnuni á sjógvi og á landi, spurdu vit løgmann, um tað kann koma hartil, at tað almenna fer inn og onkursvegna bjargar rækjuvinnuni?*

– Løgtingið hevur samtykt eitt uppskot um at seta eina skjóttarbeiðandi nevnd at viðgera tann spurningin. Tað er greitt, at tað er sera umráðandi fyri okkum, sum eru so sárbar, at vit bara hava fiskivinnuna, at vit royna at hava so nógv bein at standa á, men hinvegin skulu vit ansa eftir, at vit ikki enda aftur í eini permanentari alment stuðlaðari vinnu. Tað er tí ein ballansugongd í øllum hesum.

*– Sær tú fyri tær, at man er noyddur at fara inn við eini fyribilshjálp?*

– Tað skal eg ikki úttala meg um, men man er noyddur til at hava eyguni við øllum viðurskiftum. Vit hava eisini fingið at vitað frá vinnuni, ikki bara nú men yvir longri tíð, at har er støðan heilt álvarslig. Og tað er ein stórur spurningur, um vit yvirhøvur hava nakra rækjuvinnu, um vit ikki sjálvir finna út av tí so ella so.

*– Tú meinar sjálvur, at vit skulu halda fram við at hava eina rækjuvinnu í Føroyum?*

– Tað er klárt, at vit eiga nøkur rættindi í altjóða sjógvi. Hetta eru nøkur rættindi, sum ikki eru í umskifti við aðrar. Og tí eru tað nøkur virði hjá samfelagnum, sum vit her hava við at gera. Tí eru vit rætt og slætt noyddir til at syrgja fyri at gagnnýta teir møguleikar so væl sum vit nú einaferð kunnu. Tað hava vit kanska ikki gjørt.

Løgmaður vísir á, at vit hava ikki brúkt allar teir fiskimøguleikar, sum hava verið tey seinnu árini. Her hugsar hann um Svalbard og at tað liggja kvotadagar eftir bæði á Flemish Cap og aðrastaðni. Men hinvegin so hava vit eina vinnu, sum hevur ilt við at klára seg uttan at man ger eina skipan so ella so viðgongur hann.

*– So eru tað tey, sum siga, at kann vinnan ikki bera seg, so má hon fara!*

– Tað er so ein støðutakan, men spurningurin er her um at geva stuðul ella skapa karmar.

*– Hvat eru tað so fyri karmar tú sipar til?*

– Har hevur felagið Rækjuskip sjálvt nevnt fleiri alternativ. Eg gangi út frá, at tann nevndin, sum verður sett, fer at viðgera allar teir spurningarnar.

*– Hondina á hjartað, trýrt tú uppá, at vit missa rækjuvinnuna heilt á gólvið?*

– Nei, tað geri eg ikki.

Løgmaður viðgongur, at tað eisini hevur nógv at siga, at vit eiga eitt sera nýtímans rækjuvirki á landi. – Virkið á Oyri er jú eisini til fyri at fáa skapt størri virði burtur úr teimum rækjunum, sum annars vanliga verða fluttar út til aðrar at framleiða. Og tað hevur stóran týdning. Har hevur man so eisini bart fyri at skapa betri handilsavtalur. Tað hevur eydnast við at man hevur fingið kvotuna úr 2000 til 3000 tons.

*– Sær tú fyri tær ósemju í landsstýrinum eitt nú við Tjóðveldisflokkin um at fáa umrøddu karmar upp at standa?*

– Nei tað geri eg ikki. Vit skulu til at semjast um, hvat vit skulu gera. Allir eru samdir um, at vit skulu umganga at fara aftur í eina stuðulsvinnu sum so burturav, men eg trúgvi, at vit nokk skulu finna nakrar semjur um at skapa karmar fyri vinnuna, soleiðis at vit fáa størst samfelagsgagn burtur úr.



*Anfinn Kallsberg, løgmaður er fegin um at sleppa at seta fiskivinnustevnuna í Runavík.*

*Mynd: Jan Müller*

# Mugu koppseta alifiskin

FISKIVINNUSTEVNA
*Jan Müller*

Eitt er rækjuvinnan. Annað er alivinnan. Løgmaður viðgongur, at har stendur heldur ikki alt ov væl til. – Tað er væl sami trupulleiki, ið er galdandi har. Tað gongur jú upp og niður marknaðarliga sæð í vinnuni altíð. Nú er tað bæði sjúka og konjunkturur á heimsmarknaðinum, sum gongur ímóti, men vit mugu royna at hava eina vinnu, sum er so væl konsoliderað sum møguligt, at hon klárar at taka nøkur av teimum nosunum, sum altíð vilja koma.

*– Er hon ikki tað í løtuni?*

– Tað veldst um, hvussu leingi henda støðan stendur við. Tað er ilt at siga men tað sum hevur allar størsta týdning er at vit fáa møguleika til at fáa heilsustøðuna hjá alilaksinum uppá eitt hægri støði enn hon er í dag, nevniliga við koppseting.

*– Men tað almenna hevur ikki ætlan um at fara inn og betra um karmarnar hjá vinnuni?*

– Vit hava sum so ikki nakra ætlan um tað. Vit hava neyvt samband við alivinnuna.

# Skilagott at halda fiskivinnustevnur

FISKIVINNUSTEVNA
*Jan Müller*

Hetta er aðru ferð, at tað verður skipað eini stórari fiskivinnustevnu í Føroyum við føroyskari og altjóða luttøku. Løgmaður, sum fer at seta stevnuna, heldur tað vera óført og gott, at stigtakararnir halda tørn og fara undir enn eina stevnu av hesum slag. Hetta er okkara høvuðsvinna og tað hevur so avgjørt relevans fyri okkum at vera við, eisini tá stórar og týðandi ráðstevnur verða hildnar. Løgmaður sipar við hesum eisini til tær mongu stevnur av slíkum slag, sum hvørt ár verða fyriskipaðar í øðrum londum og har føroyingar í stórum tali luttaka.

Tað var eisini Anfinn Kalsberg, løgmaður, sum setti tí fyrstu fiskivinnuráðstevnuna í Føroyum av hesum slag. Tað er heldur ikki so løgið, at tað er júst løgmaður, sum hevur ein týðandi leiklut í stevnu av slíkum slag, tí sjálvur hevur hann ikki færri enn tvær ferðir røkt sessin sum landsstýrismaður í fiskivinnumálum. Tað var í 1983 og 84 og eitt stutt skifti í 89.

– Fiskivinnan er okkara høvuðsvinna, og tí vil hon altíð hava eitt pláss sera frammaliga sigur løgmaður, sum sær fram til at seta Fish Fair í næstum og har hitta mong góð fólk.

# Nýggja Norröna komin – ein fantastisk hending

FISKIVINNUSTEVNA
*Jan Müller*

Ein av karmunum um komandi fiskarístevnuna í Runavík í næstum er nýggja Norröna. Hvat sigur løgmaður um nýggjasta a skipið í flotanum – til hesa risaíløguna uppá 700 mill. kr.!

– Eg haldi hetta er ein fantastisk hending. Og tað vísir, at tað ber til at arbeiða nøkur ting upp. Tí, sum tað hevur verið sagt, so metti man Smyril vera alt ov stóran, tá hann kom, og tá gamla Norröna kom, søgdu fólk tað sama. Men í báðum førum gingu bert nøkur fá ár og so vóru tær ov lítlar. Tað kann tykjast at vera øgiligt at fara undir eina slíka íløgu. Hon krevur nógv. Ein veldugan innsats frá øllum pørtum. Men eg vóni og ynski, at tað fer at ganga teimum gott, at tað eisini hesaferð verður soleiðis, at tað verður full nýtsla av kapasitenum innan fyri stutta tíð.

Hvat viðvíkur stóru íløguni í Norrönu so vísir løgmaður á, at hon byggir á fullar professionellar og handilsligar metingar, og gongur hann út frá, at teir, sum hava gjørt hetta arbeiðið, hava mett tað vera skilagott. Tað krevur tó nógv av teimum.

– Hetta er ein veldugur útviklingur vit eru í, sum ikki bert fer at fáa stóran týdning fyri Føroyar men fyri alt økið í Norðuratlantshavi. Tað vil avgjørt at koma at vaksa um tað samstarv, sum longu er millum londini her.

Nú bleiv oljan ikki tað bein, sum so mong høvdu sett sítt álit til – í hvussu so er ikki enn. Men løgmaður telist millum teirra, sum er tolin og heldur, at vit hava stundir at bíða. – Her eru professionell feløg, sum stíla fyri, og vit mugu bara hava tol og álit á teimum. Um vit vera oljuland innan fyri 5, 10 ella 30 ár er ikki tað avgerandi. Tað avgerandi er, at hetta byggir á eitt haldgott og skilagott grundarlag. Og at vit ikki missa okkum sjálvi burt.